# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 3 | 0 | 0 | 7-2 | 9 |
| 2 Rumenia | 1 | 1 | 1 | 4-4 | 4 |
| 3 Ongland | 1 | 0 | 2 | 5-6 | 3 |
| 4 Týskland | 0 | 1 | 2 | 1-5 | 1 |

**Fjórðingsfinala**

24.06 Portugal-Turkaland

## Bólkur B

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 3 | 0 | 0 | 6-2 | 9 |
| 2 Turkaland | 1 | 1 | 1 | 3-2 | 4 |
| 3 Belgia | 1 | 0 | 2 | 2-5 | 3 |
| 4 Svøríki | 0 | 1 | 2 | 2-4 | 1 |

**Fjórðingsfinala**

24.06 Italia-Rumenia

## Bólkur C

**Jugoslavia-Spania 3-4 (1-1)**
1-0: Milosevic 31.
1-1: Alfonso 39.
2-1: Govadarica 51.
2-2: Munitis 53.
3-2: Komljenovic 54.
3-3: Mendieta (br.) 90.
3-4: Alfonso 90.

**Slovenia-Noreg 0-0**

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Spania | 2 | 0 | 1 | 6-5 | 6 |
| 2 Jugoslavia | 1 | 1 | 1 | 7-7 | 4 |
| 3 Noreg | 1 | 1 | 1 | 1-1 | 4 |
| 4 Slovenia | 0 | 2 | 1 | 4-5 | 2 |

**Fjórðingsfinala**

25.06 Spania-Frakland

## Bólkur D

**Danmark-Kekkia 0-2 (0-0)**
0-1: Smicer 64.
0-2: Smicer 67.

**Frakland-Holland 2-3 (2-1)**
1-0: Dugarry 8.
1-1: Kluivert 14.
2-1: Trezeguet 30.
2-2: F. de Boer 50.
2-3: Zenden 59.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Holland | 3 | 0 | 0 | 7-2 | 9 |
| 2 Frakland | 2 | 0 | 1 | 7-4 | 6 |
| 3 Kekkia | 1 | 0 | 2 | 3-3 | 3 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 3 | 0-8 | 0 |

**Fjórðingsfinala**

25.06 Holland-Jugoslavia

# Út-norður

*At tað kann vera sera stutt frá gleði til sorg í fótbólti, noyddust norðmenn at ásanna mikukvøldið*

JÁKUP MØRK

Sat sjálvur og hugdi at NRK, tá dysturin millum Noreg og Slovenia varð leiktur mikukvøldið. Helt tað vera stuttligari at hoyra, hvat norsku frásøgumenninir hildu um dystin, heldur enn at hoyra meira óheftur viðmerkingarnar frá dønum.



*Grátandi av gleði kundu sponsku áskoðararnir fegnast um, at land teirra í seinasta løtu vann á Jugoslavia*

### Tveir minuttir í himmiríki

Dysturin sjálvur var sum so eingin uppliving. Norðmenn spældu, sum teir hava gjørt higartil í endaspælinum. Eina væl pakkaða verju, sum slovenar ikki megnaðu at bróta ígjøgnum, og so langar bóltar niðan til áleypararnar, sum tó høvdu sera ilt við at skapa nakrar veruligar málmøguleikar.

0-0 gjørdist úrslitið, men norsku frásøgumenninir tóktust einki leggja í, at spælið í dystinum ikki hevði verið serliga undirhaldandi. Støðan í hinum dystinum, nú 92 minuttir vóru farnir, var 3-2 til Jugoslavia, so noðmenninir róptu gleðisróp um, at nú »er Norge i kvarfinalen«. 30 sekund seinni, gjørdist støðan enn meira spent. Brotsspark var til Spania, sum javnaði til 3-3. Noreg var framvegis í fjórðingsfinaluni, men tveir minuttir restaðu av spanska dystinum.

Skíggin var nú tvíbýttur, soleiðis at fylgjast kundi við, hvussu spentir norsku leikararnir vóru, meðan spaniólar tveittu alt fram í seinastu royndini at vinna á jugoslavnum. Tríggjar mans á egnari hálvu, meðan restin fór niðan í brotsteigin, og mín sann, um hetta ikki gav úrslit, tá Alfonso kundi skjóta Spania upp á 4-3.

Sjálvt um Noreg nú var úti, so ljóðaði tað kortini eins og frásøgumaðurin fagnaði Spania, og tað hevði hann sum so eisini alla orsøk til.

### Álop skal loysa seg

Spanski sigurin var nevnliga eitt frálíkt dømi um, at tað viðhvørt loysir seg at spæla álopsfótbólt, heldur enn at dúva ov nógv upp á verjupartin.

Gaman í er Noreg grannatjóð okkara, men sæð við fótbóltseygum, er tað eingin synd, at øll trý norðanlondini nú eru send heim úr endaspælinum.

Spæliætlan teirra hevur alla tíðina verið at dúva upp á mistøk hjá mótstøðuliðunum, heldur enn at skapa nakað sjálvi. Tá er munandi stuttligari at hyggja at latinsku londunum, har individualistarnir veruliga sleppa fram at, hóast sjónleikur teirra dregur frá í heildarmetingini.

At tey trý norðanlondini bert megnaðu at skjóta trý mál tilsamans í teimum níggju dystunum, sum tey vóru partur av, sigur eisini nóg mikið.

Nei, fótbóltsspælið saknar ikki norðurlendska íkastið, sum støðan er í løtuni.

### Rættir vinnarar

Nú bólkaspælið er liðugt spælt, kann kanska takast eitt sindur samanum, og yvirhøvur er helst galdandi, at røttu londini komu víðari úr ymsu bólkunum. Við hesum veråur meint, at tað eru londini, sum hava sýnt besta fótbóltin, sum hava vunnið seg fram.

Í dag verður so fyri fyrstu ferð í tvær vikur talan um fótbóltsfrían dag, men í morgin verður aftur herjað á.

Tvær fjórðingsfinalur bæði leygardagin og sunnudagin, og alt í alt er líkt til, at talan kann gerast um fýra sera áhugaverdar dystir.

Vónandi verður tað hugurin at vinna, heldur enn ræðaslan fyri at tapa, sum verður avgerandi fyri úrslitið av hesum.

# EM-stubbar

### Dómari raktur

Rættuligt rok tók seg upp millum jugoslavisku áskoðararnar, undir dystinum móti Spania mikukvøldið.

Áskðarunum dámdi lítið, at dómarin rak Jokanovic av vølli miðskeiðis í seinna hálvleiki, og eitt úrslit av hesum var, at myntir vórðu kastaðir eftir dómaranum, sum fekk eitt lítð sár omanfyri eygað.

Eisini rann onkur áskoðari inn á vøllin, fyri at siga sína hugsan um dømingina.

Jú sanniliga varð talan um ein undirhaldandi dyst.

### Italska verjan er klár

Bæði Paolo Maldini og Mark Iuliano hava seinastu dagarnir verið í iva um, hvørt teir fóru at verða nóg væl fyri, til at spæla við í fjórðingsfinaluni móti Rumenia.

Nú er tó líkt til, at báðir vera við í týdningarmikla dystinum, so Zoff kann gleðiliga staðfesta, at verjuparturin ikki er viknaður.

### Keegan verður verandi

Meðan týska fótbóltssambandið lat Erich Ribbeck siga farvæl eftir miseydnaða endaspælið, hevur enska FA fult álit á Kevin Keegan.

Ein talsmaður hja FA segði mikudagin, at teir hava fult álit a evnunum hjá Keegan, og at tað als ikki hevur talan um at loysa hann ur venjarastarvinum.

Hinvegin er nú lagt upp til eitt ættarliðsskifti á enska landsliðnum, tí leikararnir ikki vóru nóg dugnaligir undir EM-endaspælinum.

### Ymiskt verður gitt

Eftir sigurin á fronsku heimsmeistarunum, eru hollendingar nú aftur favorittar at vinna EM. Í øllum førum um vit skulu trúgva donsku Tipstænastuni.

Holland gevur nú pengarnar 3 ferðir aftuir, meðan Frakland er farið upp á 3,8.

Italia og Spania eru næstu favorittarnir, og eru odds teirra ávíkavist 4,3 og 6,5.

Ensku veddingarfyritøkurnar eru tó als ikki samdar við tipstænastuni, tá hesir siga Holland vera favoritt. Gjáramorgunin góvu teir bert peningin 2,25 ferðir aftur, um Frakland verður meistari, meðan Holland nu gevur 2,5.

Heldur ikki er semja á næstu plássunum. Har halda onglendingar, at italiumenn og porutgisar hava betri møguleikar enn Spania.



### Ætlaður harðskapur

Danska blaðið, Jyllands-Posten, skrivar, at harðskapurin hjá ensku áskoðarunum er meira enn bara tilvildarligt herverk, har ónøgdir ófriðarkroppar gera um seg.

Smabært blaðnum hava enskir hooligans greitt frá, at hendingarnar í bæði Keypmannahavn (undan UEFA-cup finaluni) og í Charleroi vóru lagdar til rættis í samstarvi við eina sjónvarpsstøð.

Eftir hetta er eisini komið fram, at bæði sjonvarpsstøðir og myndamenn høvdu leigað seg inn á eitt hotel í Charleroi í góðari tíð, har teir høvdu gott sýni oman yvir staðið, har rokmiklu onglendingarnir fóru til verka.

Sostatt er nú líkt til, at sjónvarpsstøðirnar nýta øll vápnm, til tess at tekkjast hyggjarunum, soleiðis at møguleikin fyri lýsingarkrónum verður størri.

### Milosevic ovast

Savo Milosevic, sum gjørdist kendur fyri alt annað enn máltevið, tá hann royndi seg í enskum fótbólti, er nú ovast á máltindinum fyri EM-endaspælið.

Milosevic er nevnliga einasti spælari, sum hevur skotið fýra mál higartil í endaspælinum.

Zlattko Zahovic og Sergia Conceicao hava skotið trý mál hvør, meðan sjey leikarar hava skotið tvey mál. Hesir eru Thierry Henry, Hakan Sukur, Alan Shearer, Alfonso Perez, Boudewijn Zenden, Patrick Kluivert og Frank de Boer.



**Nýggjar TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**

**Maritim fyrireiking**
Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 7. august 2000 og endar við próvtøku í desember 2000. Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og navigatiónsskúla. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

**Støddfrøði á hægri støði**
Um nóg nógv tekna seg, skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli – í samstarvi við Maskinmeistaraskúlan og samráð við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum – fyri skeiði í støddfrøði á hægri støði fyri maskinmeistarar og onnur.

Skeiðið er ætlað sum partvísur sjálvlestur, og byrjar týsdagin 1. august 2000 og endar við skrivligari og munnligari próvtøku um miðjan oktober 2000. *Lokið prógv gevur atgongd til støðisútbúgvingina í stødd- og alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, treytað av, at kunnleikin til alis- og evnafrøði eisini kann góðtakast.*

**Upptøkukrøv:**
- maskinmeistaraprógv
- skipsføraraprógv
- studentsprógv við støddfrøði B, alisfrøði B og evnafrøði C ella
- onnur tilsvarandi útbúgving í støddfrøði og alis-/evnafrøði.

**Høvuðsevnini í undirvísingini eru:**
Vektorar í 2 og 3 dimensiónum, vektorfunktiónir, serligar funktiónir, markvirði, infinitesimalrokning, differentialrokning, integralrokning, differentiallíkningar.

**Undirvísingartilfar:**
Preben Madsen: Teknisk matematik bind 2 og 3.
Erhvervsskolernes forlag 1997
Hewlett Packard:
HP48 roknimaskina og HP48 Brugerhåndbog. *Fæst til keyps á Maskinmeistaraskúlanum.*

**Tilmelding:**
**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
Frúutrøð 1 • Postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

**Lærarar**

Søkt verður eftir 2 lærarum til Hvalbiar Skúla skúlaárið 2000/2001. Eitt fulltíðarstarv og eitt 25 tímar.

Størvini eru tíðaravmarkað. Lønt verður samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 7/7-00.

**Hvalbiar Skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba

**Landssjúkrahúsið**
**FO-100 Tórshavn**

**Sjúkrasystrar til psykiatrisku deild**

**Á Deild 2** er eitt starv sum sjúkrasystir leyst at søkja til setan pr. 1. august 2000 til 31. juli 2001.

Deildin er ein afturlatin akutt móttøkudeild við 12 seingjarplássum.

Deildin er tvørfakliga samansett av sjúkrasystrum, pleygarum og sosial- og sunnheitsassistentum og lækna.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Andersen, deildarsjúkrasystir á tlf. 31 35 40 lokal 422 ella Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 266.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Anette Noer, deildarsjúkrasystir á tlf. 31 35 40 lokal 423 ella Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 266.

Umsóknarfreistin er 14. juli 2000, kl. 14.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Verkfrøðingur**

Tórshavnar havn søkir eftir verkfrøðingi til at standa fyri teknisku umsitingini av bryggjum, bygningum o.ø. ognum hjá havnini eins o.o. fyrireikandi og umsitandi arbeiði.

Roknað verður við at umsøkjarin hevur royndir innan bygging/eftirlit/projektering, og at hann hevur kunnleika til EDV.

Umsøkjarin skal hava lætt við at samskifta, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava vilja til at søkja nýggja vitan.

Tórshavnar havn kann bjóða eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum fyri framman.

Løn sambært sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Tórshavnar havn.

Umsóknir saman við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Tórshavnar havn**
Postboks 103
110 Tórshavn

í seinasta lagi 6. juli 2000.

**Sethús í Lamba til sølu**



Húsini, ið eru væl hildin, standa í friðarligum, náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni.

Grundøkið, matr. nr. 29e, er 854 m².
Húsini eru bygd í 1975 og eru 250 m² til víddar.
Kjallarahæddin: Kjallararúm, gongd, stova v/ køki, vaskirúm og fýrrúm.
Miðhæddin: Stova, køkur, wc og gongd.
Loftshæddin: 4 kømur, baðirúm og gongd.
Rúmligur hjallur og garaga við terassu á.
Rundan um húsini er væl røktur urtagarður.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu síggja húsini eftir nærri avtalu við at venda sær til tlf. 447761 ella 283533, fax 319736.

*Lýsið í* **sosialinum**

**Urtagarðsarbeiði**

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53